Fyrstur við tí seinasta
5 ferðir um vikuna

Tekna teg sum haldara nú, so fært tú Sosialin ókeypis restina av hesum ársfjórðinginum


Sosialurin
Nr. 96 • týsdagur • 22. mai 2001 • 75. árgangur • Kr. 10,00
Dansurin gekk so lystiliga í Havn síða 4
www.sosialurin.fo
Arbeiðsleysur:
Jákup er liðugur í Herfølge
Ítróttur, s. 13–28

Ja!

Sjálvandi vil eg halda Sosialin

Undirritaði teknar seg sum haldara av Sosialinum, og fái blaðið 5 ferðir um vikuna.

Navn: ______

Bústaður: ______

Postnr.: ______

Bygd/býur: ______

Undirskrift: ______

Ókeypis
Verður sent ópostað
Sosialurin rindar postgjaldið

64

Sosialurin
Postsmoga 76
110 Tórshavn




# Eysturoyingar revsa Sámal Petur

**- Eysturoyingar og serliga mítt nærumhvørvi harta meg fyri tað sum er hent í mínum privata lívi. Tað kom óvart á meg, at tey so dyggiliga venda mær og flokkinum bakið, sigur Sámal Petur í Grund, formaður Sjálvstýrisfloksins**

VALIÐ
*Turið Kjølbro*


*- Valúrslitið hevði ivaleyst sæð væl øðrvísi út um Helena Dam á Neystabø stillaði upp, sigur Sámal Petur í Grund*

Fólksins dómur er eirindaleysur. Tey vilja ikki lata seg lynda innanhýsis stríðið og rumblið sum er og hevur verið í Sjálvstýrisflokkinum. Flokkurin fekk bert 434 atkvøður á valinum týsdagin ella 1,6 prosent, og tað eru 1169 atkvøður færri í mun til seinasta fólkatingsval. Formaður floksins, Sámal Petur í Grund, fekk bert 73 persónligar atkvøður í mun til 1119 seinast. Sostatt er úrslitið ikki minst ein rættiligur frammaná til formannin sjálvan.

- Vit høvdu ikki góðar vónir til úrslitið. At hava formansval í einum valdysti hevur verið ógvuliga óheppið kunnu vit siga aftaná. Vistu vit, at fólkatingsval kom nú, høvdu vit umhugsað formansvalið eina ferð enn. Hvørki landsnevnd ella starvsnevnd eru farnar til verka. Valstríðið hjá okkum hevur tí verið hálvhjartað, ongar plakatir eru hongdar upp, og vit hava sum heild lítið og einki gjørt burturúr. Tískil hava fortreytirnar fyri einum rímiligum vali verið ógvuliga vánaligar, sigur Sámal Petur í Grund.

Einki fólkatingsval hevur hilnast so illa fyri Sjálvstýrisflokkin sum hetta síðani 1953. Tó vánalig val hava eisini verið í nýggjari tíð. Í 1994 førdi rumblið sum tá var eisini til eitt vánaligt valúrslit. Valið í 1998 hinvegin hevði flokkurin veruliga viðvind við bert trimum valevnum.

- Tað er nóg mikið at hava trý valevni, tá ið tað gongur væl, men alt ov lítið, tá ið flokkurin er í mótvindi. Eg rokni við, at um vit høvdu fleiri valevni at velja ímillum, høvdu vit fingið eitt frægari úrslit. Flokkurin hevur fýra virknar politikarar, men bara helvtin stillar upp. Fólk hava helst tikið tað sum eitt vánaligt tekin, ikki minst tá ið umboðið fyri Havnina ikki stillaði upp. Úrslitið hevði ivaleyst sæð væl øðrvísi út um Helena Dam á Neystabø stillaði upp. Úteftir hevði tað víst, at flokkurin hóast alt stóð saman.

Eitt er rumblið, sum hevur verið í Sjálvstýrisflokkinum, annað er rumblið sum hevur verið um persónin Sámal Petur í Grund. Hann himprast ikki við at siga, at persónligu viðurskiftini í hansara privata lívi eru ein orsøk til, at valúrslitið er so vánaligt. Fyri tveimum árum síðani fóru Sámal Petur í Grund og konan hvør til sítt, og hetta verður hann nú revsaður fyri, heldur hann.

- Eysturoyingar og serliga mítt nærumhvørvi harta meg fyri tað sum er hent í mínum privata lívi, kann eg lesa út frá valúrslitinum. Tað kennist sum vantandi forstáilsi og sum so skilji eg tað væl, hóast eg haldi, at fólk eiga at skilja ímillum meg sum privatpersón og politikara. Tað kom óvart á meg, at tey so dyggiliga venda mær og flokkinum bakið.

Men orsøkin til vánaliga úrslitið er ikki einsamøll at finna hjá flokkinum og formanninum, heldur Sámal Petur í Grund.

- Polariseringin í føroyskum politikki er eisini ein orsøk til, at Sjálvstýrisflokkurin er dottin burtur ímillum. Í veljarakanningum undan valinum fekk flokkurin umleið 3 prosent, men so hvørt valið er nærkast og spenningurin um, hvør fór at vinna, er vorðin størri, er flokkurin púra fallin uttanfyri. Fólk hava hugsað sum so, at valið ikki hevur so nógv at siga fyri Sjálvstýrisflokkin, og tí hava eisini sjálvstýrisfólk valt at stuðla onkrum øðrum, sum hava havt størri møguleika at koma inn. Rumblið, sum hevur verið í flokkinum, hevur so ikki gjørt tað betri fyri okkum.

Sámal Petur í Grund ætlar at reisa seg aftur sum politikara og hevur í hyggju at gera alt fyri, at flokkurin fær eitt gott løgtingsval.

- Eg stúri ikki fyri, at vit fáa so vánaligt úrslit til løgtingsvalið. Vit hava áður fingið vánalig úrslit á fólkatingsvalum og góð úrslit stutt eftir á løgtingsvali, sigur Sámal Petur í Grund.

Eyðun Elttør:

# Nú skal okkurt gerast

**– Eg vil fegin gera mítt til at endurreisa Sjálvstýrisflokkin, sigur Eyðun Elttør, sum fekk meira enn tríggjar ferðir so nógvar atkvøður sum formaðurin í flokkinum**

FÓLKATINGSVAL
*Eyðun Klakstein*


*– Vit kunnu staðfesta, at vit hava mist alt ov nógvar atkvøður, og at nýggi formaðurin ikki fekk serliga nógvar atkvøður, so okkurt bendir á, at veljararnir hava víst sína misnøgd við formansvalið, sigur Eyðun Elttør*

Meðan Sjálvstýrisflokkurin hevði eitt sera vánaligt val, kundi Eyðun Elttør onkrastaðni í meldrinum fegnast um, at hann hevði fingið lutvíst góða undirtøku millum veljararnar.

Hann fekk stívliga 250 atkvøður, og tað var meira enn helvtin av atkvøðunum hjá Sjálvstýrisflokkinum. Eyðun Elttør fekk meira enn tríggjar ferðir so nógvar atkvøður sum formaðurin í flokkinum, Sámal Petur í Grund.

Nú hevur stríð verið í Sjálvstýrisflokkinum, men vísir hetta valið, at tað er tú, sum skalt savna flokkin aftur?

– Eg vil fegin gera mítt til at endurreisa Sjálvstýrisflokkin. Hetta valið var so ótrúliga vánaligt, at her má okkurt gerast. Tað er ikki vist, at eg eri maðurin, sum skal savna flokkin, men eg vil gjarna gera mín part, sigur Eyðun Elttør.

## Formaðurin lítla undirtøku

Landsstýrismaðurin við oljumálum heldur, tað eru næstan bara vánaligar umberingar fyri valúrslitinum.

– Tað hevur verið sagt, at vit mistu atkvøður, tí undirsjóvartunnilin er komin, og at fólk velja størru flokkarnar á fólkatingsvalinum, men tað er ikki nóg góð frágreiðing. Vit hava eisini havt stríð í flokkinum beint undann valinum, og tað hevur ivaleyst eisini gjørt sítt til vánaliga valið, sigur Eyðun Elttør

Heldur tú, at veljararnir á hesum valinum hava sagt sína hugsa um nýggja formannin í flokkinum?

– Vit kunnu staðfesta, at vit hava mist alt ov nógvar atkvøður, og at nýggi formaðurin ikki fekk serliga nógvar atkvøður, so okkurt bendir á, at veljararnir hava víst sína misnøgd við formansvalið.

– Nú mugu allar góðar kreftir í flokkinum seta seg niður fyri at viðgera støðuna. Her má okkurt gerast, so vit fáa flokkin á føtur aftur.

## Løn fyri gott arbeiði

Eyðun Elttør er fegin um sítt persónliga úrslit, hóast hann sigur seg illa fáa glett seg veruliga um tað, tí flokkurin annars stóð seg so illa.

Tú fekst næstan 60 prosent av atkvøðunum hjá Sjálvstýrisflokkinum. Hví fekst tú lutvíst so góða undirtøku?

– Tað er ilt at meta um, hví eg havi fingið hesar atkvøður. Tað hevur verið sagt, at Oljumálastýrið hevur gjørt eitt gott arbeiði, og her havi eg verið landsstýrismaður, so kanska fái eg løn fyri tað arbeiðið.

Fyrstu tíðina sum landsstýrismaður vart tú sera varðin og førdi teg ikki so nógv fram. Nú tykist tú vera tryggari við leiklutin. Ert tú komin í politiskan form og fært atkvøður burturúr tí?

– Tað er rætt, at eg var varðin at byrja við. Tað er umráðandi, at tú setir teg inn í títt arbeiðið, og eg haldi eisini sjálvur, eg havi lært nógv hesi árini. Nú kenni eg meg púra tryggan, tá eg havi til dømis við pressuna at gera. Tað hevur kanska eisini sína ávírkan á veljararnar.

– Eg má siga stóra takk til tey, sum hava valt meg. Eg vil ynskja Høgna Hoydal og Lisbeth Petersen tillukku við valinum, og eg vil ynskja Jóannes Eidesgaard tillukku við tí framúr góða persónliga valinum.